## Í kirkju eftir irakum

Løgreglan í Keypmannahavn tók í nátt 19 irakskar menn, sum hava fjalt seg í einari kirkju í Keypmannahavn fyri at sleppa undan at verða sendir til Irak. Tað endaði við ógvusligum bardøgum millum løgregluna og mótmælisfólk, sum krevja, at teir útvístu irakararnir sleppa at verða verandi í Danmark. Teir útvístu irakararnir hava verið í Brorsons Kirke á Nørrebro síðani í mai, men klokkan eitt í nátt tók løgreglan seg inn í kirkjuna og tók 19 ungar menn, sum eru millum tey útvístu. Kvinnurnar og børnini, sum eisini vóru í kirkjuni, vórðu flutt burtur haðani.




## Framburður í Týsklandi

Týski búskapurin, sum mer tann størsti í Evropa, er á veg burtur úr sínum ringasta bakkasti síðani seinna heimsbardaga. Hagtølini vísa, at í øðrum ársfjórðingi vaks búskapurin 0,3 prosent, og tað kom rættiliga óvart á fleiri, skrivar DR. Eisini í Fraklandi er tað farið at ganga tann rætta vegin. Har var vøksturin eisini 0,3 prosent í aprílársfjóþrðingi. Týskland er tað týdningarmesta samhandilslandið hjá dønum, og tann týska framgongdin gevur tí dønum vónir um øktan samhandil, sigur DR.

# Senda nú blóðroyndir til Týsklands

**Bara henda mánaðin hevur Landssjúkrahúsið gjørt ílegukanningar fyri sjúkuna CDT av 264 fólkum, og umleið 50 carnetine-royndir eru sendar bæði til Týsklands og til Danmarkar**

CDT

*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin*



*Fólk í stórum tali lata seg kanna fyri CDT*
*(savnsmynd)*

Kunningin um sjúkuna CDT hevur rættiliga vakt ótta millum fólk, ið eru skyld við tey, sum hava fingið staðfest sjúkuna.

- Her er fult hús hvønn dag, sigur Marita Simonsen, bioanalytikari á rannsóknarstovuni á Landssjúkrahúsinum.

Bara frá 1. til 12. august hevur Rannsóknarstovan tikið blóðroyndir til ílegukanningar av samanlagt 264 fólkum.

18 blóðroyndir fyri at kanna carnetine-innihaldið í blóðinum eru sendar til Týsklands, og 30 slíkar royndir eru sendar til kanningar í Danmark.

Upp í 27 fólk um dagin hevur Rannsóknarstovan tikið blóðroynd av um dagin fyri CDT.

Frammanundan eru fleiri kannað, og tað streymar framvegis inn av fólki, sum vilja kannast fyri CDT.

Eisini føroyingar, sum búgva í Danmark, lata seg kanna har.

Framyvir verður mannagongdin væntandi, at fyrst verða fólk kannað fyri innihaldið av carnetine í blóðinum, og gevur talið ábending um, at fólkini hava sjúkuna, verður ílegukanning gjørd.

Rannsóknarstovan sendir royndirnar til kanningar, har sum besti prísur fæst.

Tað tekur vanliga umleið tvær vikur at fáa svar.

## Seinastu postkortini

**Sjónleikarhúsið fer nú undir seinastu sýningarnar av "Postkort úr Havn"**

Leikurin er bygdur á minnisverdar hendingar í Havn síðani miðskeiðis í 80-árunum og fram til dagin í dag. Sýningin er sett saman av leikbrotum, kryddað við sangi og tónleiki, so tiltakið minnir um eina kabarett.

Leikararnir eru bæði royndir og minni royndir. Millum tey, sum spæla við, kunnu nevnast Kári K. Mouritsen, Kjartan Kristiansen, Sonni Smith, Petra Iversen, Hjørdis Trond, Árni Nicolajsen, Heri Kragesteen.

Leikstjórar vóru Ria Tórgarð og Barbara Christophersen.

Seinastu sýningar verða fríggjakvøldið kl. 20.00 og leygar- og sunnudagin kl. 17. Atgongumerki fáast á Kunningarstovuni og við dyrnar ein tíma undan sýning.



# Bíðar eftir trygdini

**Reiðarin á trolbátinum Sigrun hevur framvegis ikki svarað, um hann reisir milliónina, sum ákæruvaldið hevur kravt í trygd fyri, at skipið kann loysa**

ÓLÓGLIGUR FISKISKAPUR

*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*




*Sigrun hevur nú ligið í Leirvík í eina viku*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Tað er framvegis ikki greitt, hvussu verður við trolbátinum Sigrun, ið Tjaldrið tók mánadagin í seinastu viku. Sigrun varð tikin fyri at trola innan fyri 12 fjórðingar.

Ákæruvaldið gav loyvi til, at Sigrun seinasta hósdag fór til Leirvíkar at landa, og síðan hevur báturin ligið har.

Hetta er eitt størri mál, og tí hevur ákæruvaldið ikki avgreitt málið.

Ákæruvaldið hevur kravt, at reiðarin setir eina millión krónur í trygd fyri at kunna loysa, men reiðarin hevur ikki svarað, um hann góðtekur hetta krav og reisir milliónina ella ei.

Jónsvein Knudsen vildi í dag ikki gera nakrar viðmerkingar til Sosialin um málið. Sostatt fæst ikki at vita, um bíðað verður eftir, at skiparin tekur støðu, ella tað gongur minni væl at reisa kravdu upphæddina.

Ákæruvaldið metir málið at vera sera umfatandi, og at Sigrun á 21 túrum hevur fiskað ólógliga, bæði innan fyri 12 fjórðingar, í stongdum kassum og bæði.

Sami skipari var ikki allar túrarnar, men enn er bara ein skipari skuldsettur.